**Sumbiar skúli søkir eftir dugnaligum lærarum og námsfrøðingi til skúlaárið 2023/24.**

**Søkt verður eftir lærarum og námsfrøðingi, sum:**

· eru røkin, nærløgd og stundislig
· eru fyrikomandi og hava ein positivan hugburð
· eru samvitskufull og álítandi
· duga væl at samstarva
· duga væl við børnum

**Vit søkja eftir:**

· einum lærara til tíðaravmarkað starv, skúlaárið 2023/24 fyri lærara í farloyvi
· einum lærara til tíðaravmarkað starv, skúlaárið 2023/24 vegna avlopstímar
· einum námsfrøðingi til tíðaravmarkað starv, skúlaárið 2023/24

Endaliga tímatalið fyri tíðaravmarkaða lærarastarvið vegna avlopstímar, verður ikki ásett, fyrr enn eftir 1. september 2023.

Námsfrøðingastarvið er 22 klokkutímar um vikuna, tær vikurnar, ið skúlin er opin í skúlaárinum 2023/24.

**Um størvini**

Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu átaka sær at undirvísa í innskúling til og við 7. fl, og, umframt føroyskt og rokning, kunnu átaka sær m.a. at undirvísa í náttúru/tøkni, svimjing/ítrótti, enskum, donskum og smíð.

Skúlanum tørvar ein námsfrøðing til at skapa eitt námsfrøðiligt tilboð á skúlanum til næmingar, sum hava avbjóðingar. Starvið kann innihalda námsfrøðiligar uppgávur í bólkum, ein til ein, og inni í flokkunum.

**Førleikakrøv**

Til lærara- og námsfrøðingastørvini krevjast ávikavist lærara-/námsfrøðingaprógv.

Onnur, sum ikki hava nevndu útbúgvingar, eru tó vælkomin at søkja. Um eingin umsøkjari lýkur førleikakrøvini, kunnu skikkaði ófaklærd fólk verða sett.

**Lønar- og setanartreytir**

Lønar- og setanartreytir hjá lærarum eru sambært sáttmálanum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 - 29.2.

Lærarastørvini eru sáttmálasett, uttan so, at tann, ið sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Námsfrøðingurin verður løntur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Barnaváttan verður kravd í samband við setanina.

**Umsóknir**
Umsóknir, saman við avriti av prógvi (ella fyribilsprógvi), skeiðum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera Sumbiar skúla í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni klokkan 12:00. Adressan er:

**Sumbiar skúli**
**Ovarivegur 9**
**970 Sumba**

ella umvegis teldupost: **sum@sumbiarskuli.fo**

Meir fæst at vita um størvini við at venda sær til fyrstalæraran, Guðrun í Líðini, á tlf 37 06 66.